## Føroya Arbeiðsgevarafelag vitjar Brússel

Evropa-politikkur stendur ovarlaga í føroyskum politiskum kjaki. Nevndin fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í hesum viðfangi vitjað í Brússel í døgunum 8-11 oktober. Endamálið við ferðini hevur verið at fáa til vega hollari fakligt grundarlag at nýta í viðgerðini av Evropa-politikkinum. Nevndin hevur verið á fundum við EFTA (www.efta.int), Næringslivets Hovedorganisasjon (www.nho.no), Samtøk Atvinnulífsins (www.sa.is), BusinessEurope (www.businesseurope.eu), Sendistovu Noregs (www.eu-norge.org), Sendistovu Íslands (www.iceland.org/be) og Sendistovu Føroya (www.faroes.be) til ES. Við í ferðalagnum vóru Jóhan Páll Joensen (frm), Kristoffur Laksá (nfrm), Bergur Poulsen, Jóhanna í Bergi, Jón Danielsen og Magni Arge umframt Marita Rasmussen og Esther Dahl frá Vinnuhúsinum.

# LÍV mist 150 milliónir uppá partabrøv



*Íløgur í partabrøv hava givið stórt avkast seinastu árini, men hava í seinastuni givið eitt tap á 30 prosent, svarandi til 150 milliónir, sigur Tummas Eliasen, stjóri í Føroya Lívstrygging*

**Virðisfallið á partabrøvum seinastu tíðina hevur higartil kostað Føroya Lívstrygging 150 milliónir krónur. – Vit hava mist nógv, og um allan marknaðin, sigur Tummas Eliasen, stjóri í Føroya Lívstrygging**

TRYGGINGAR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Føroya Lívstrygging hevur nógvan pening um hendi, og stórur partur av hesum peningi verður settur í umferð, til tess at fáa mest møguligan vinning burturúr. Tilsamans umsitur Føroya Lívstrygging umleið 2,4 milliardir krónur, harav millum 500 og 600 milliónir eru sett í partabrøv.

- Hesar íløgurnar í partabrøv hava givið stórt avkast seinastu árini, og sæð í ljósinum á tí sær ikki illa út. Men nú í seinastuni eru tey fallin útvið 30 prosentum, og hetta merkir at Føroya Lívstrygging hevur mist út móti 150 milliónir krónur uppá partabrøv seinastu tíðina, staðfestir Tummas Eliasen, stjóri í Føroya Lívstrygging.

Fyri hetta árið, í mun til undanfarin ár, sær minni gott út fíggjarliga hjá Føroya Lívstrygging. Samlaða avkastið fyri felagið er minus seks prosent. At avkastið bert er minus seks prosent, tá partabrøvini geva minus 30 prosent, kemst av at partabrøv bert eru umleið fjórðingurin av íløgunum hjá felagnum, meðan íløgur í lánsbrøv eru tríggir fjórðingar, umleið 1,6 milliard.

- Lánsbrøvini hava givið nakað av avkasti. Vit hava fingið kursvinning av teimum av tí at rentan er hækkað, og hetta vigar upp móti tapinum av partabrøvum, sigur Tummas Eliasen, stjóri í Føroya Lívstrygging.

### Tap um allan marknaðin

Ovurstóra tapið av partabrøvum er orsakað av fíggjarkreppuni, sum herjar um allan Heimin í hesum døgum. Stór virðisminking hevur verið á mestsum øllum partabrøvum í øllum pørtum av marknaðinum.

- Stórsta tapið hevur nokk verið í partabrøvum í fíggjarstovnum, sum eru minkaði serliga nógv. Eisini stórir fíggjarstovnar, sum ein ikki væntaði fóru at verða raktir av fíggjarkreppuni, eru falnir nógv í virði, sigur Tummas Eliasen.

Sum nú er hevur Føroya Lívstrygging tó ikki fullkomiliga mist nakrar pengar. Partabrøvini eru minkaði nógv í virði, men ongar íløgur eru gjørdar í feløg, ið eru farin á húsagang, og tí eru pengarnir ikki farnir fyri skeyti. Virðisbrøvini eru minkaði nógv í virði, men av tí at feløgini ikki eru farin á húsagang, kunnu partabrøvini aftur fara at geva avkast tá støðufesti aftur kemur á fíggjarmarknaðin og virðisbrøvini fara at vaksa í virði aftur.

Føroya Lívstrygging hevur eisini mist nakað av peningi upp á felagið hjá Bjarta Mohr, sum eigur Topaz, og sum eisini var frammi fyri kortum, men enn er einki felag farið á húsagang.

Føroya Lívstrygging hevur heldur ikki gjørt nakra íløgu í Íslandi, har útlitini eru alt annað enn góð fyri tíðina, og har óstøðug viðurskifti enn valda, og tískil eru heldir eingir pengar farnir fyri skeyti har.

## Peningurin í LÍV er tryggur

**Føroya Lívstrygging hevur mist 150 milliónir uppá partabrøv og er harafturat ikki við í tryggingarpakkanum hjá danska statinum. – Men peningurin í Føroya Lívstrygging er tryggur, sigur Tummas Eliasen, stjóri**

TRYGGINGAR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Hóast fallið á partabrøvum hevur kostað felagnum nógv higartil, staðfestir Tummas Eliasen, at peningurin í Føroya Lívstrygging er tryggur, sjálvt um peningurin har ikki er umfataður av stóru bjargingarætlanini hjá danska statinum.

- Íløgurnar í lánsbrøv, sum eru umleið 1,6 milliard krónur, eru heilt tryggar. Lánsbrøvini eru trygg á tann hátt, at lánsbrøvini eru næstan tað sama sum umfataði av statsgaranti, sigur Tummas Eliasen, stjóri í Føroya Lívstrygging.

Íløgurnar í lánsbrøv og innskot í fíggjarstovnar eru tríggir fjórðingar av samlaðu íløgunum, meðan íløgurnar í partabrøv eru ein fjórðingur av íløgunum hjá felagnum, og tí eru størstiparturin av íløgunum heilt tryggur.

Afturat hesum eru allar tryggingar, sum vórðu teknaðar fram til ár 2000, teknaðar við landskassaveðhaldi. Hesar tryggingar eru millum 70 og 80 prosent av teimum tryggingum, sum eru teknaðar í Føroya Lívstrygging, og tí er peningurin í Føroya Lívstrygging tryggur.

- Fólk fáa tann pening útgoldnan, sum tey hava rætt til, og har er eingin vandi á ferð, staðfestir Tummas Eliasen, stjóri í Føroya Lívstrygging.